# miðstøðini ger allan munin



*Jákup saman við dóttrini Jóhonnu og foreldrunum Ásu og Poul uppi við Stórutjørn*

ikki, at hann sjálvur kemur heimaftur, sum støðan er nú, men vil tó ikki vísa aftur, at hann vendir nøsini aftur hendanvegin, tá pensiónsaldurin nærkast.

Jákup sigur seg vitja í Føroyum einar fýra ferðir um árið, men konan vitjar tó oftari. Tey eiga fimm børn, og onkur teirra hevur eisini hug at flyta til Føroya.

– Man flytur ongantíð burtur. Fyrst ert tú bara fyribils í feriu, og so gongur tíðin. Eg búði í fimm ár í eini lítlari íbúð í Íslandi við familjuni, men so kemur tú til eitt punkt, har tú noyðist at taka eina støðu, heldur Jákup fyri.

Í fyrstu syftu sigur Jákup seg sakna avbjóðingarnar og lívsstílin, um hann skuldi búð her í Føroyum, og harafturat sigur hann tað vera lættari hjá honum at stýra sínari fyritøku úr Íslandi enn úr Føroyum. Við núverandi flogsambandi úr Føroyum sigur hann tað nevniliga als ikki bera til at gera, tað hann ger. Tað tekur alt ov nógva tíð, um komast skal úr Føroyum, tí nógv ferðing skal sjálvandi til. Í desember og januar er ikki so nógv ferðing hjá honum, men øðrvísi sær út í hinum mánaðunum, tá hann ferðast eina ferð um vikuna. Og tá kunnu ferðamálini eins væl vera London og USA sum onnur støð, har handilssambond skulu knýtast.

– Jú , vikurnar kunnu vera intensar, sigur hann.

### Heilsumiðstøðin gevur hugskot

Hann sigur seg tó altíð vera heima hjá familjuni í vikuskiftunum, og tað er helst ikki av ongum, at hann sær stórar fyrimunir í at byggja stóra heilsumiðstøð og stór ítróttarøki á Stórutjørn, tí sjálvur er hann hálvanannan tíma um dagin í eini fitness- ella heilsumiðstøð. Og tað er hetta hann sipar til, tá hann nevnir lívsstílin, tí hann metir ikki, at hann hevði megnað tað, hann hevur megnað, uttan hesa dagligu vitjan.

– Tað er sum at spæla billiard. Tú kanst standa og halda alt vera ómøguligt, men fert tú so og hyggur at spælinum frá hinari síðuni av borðinum, so sær verðin heilt øðrvísi út, sigur Jákup um hvussu tað kann stimbra sinnið og geva íblástur at røra kroppin.

Sjálvur sigur hann seg arbeiða 8 tímar um dagin, men at hann arbeiðir tvífalt so effektivt nú, sum tá hann arbeiddi 16 tímar um dagin.

### Flottari enn í Íslandi

Umframt at hugsa nógv um trygdina á Stórutjørn – har verða næstan eingir vegir við bilum millum húsini – so skal familjan sum nevnt setast í hásæti.

Men Jákup dylir ikki fyri, at íblásturin er íslendskur, hóast hann ikki vil vera við, at hann er einsamallur upphavsmaður til verkætlanina.

Sjálvur kallar hann lítillátin arkitektin, Selmar Nielsen, fyri "pápa" hjá projektinum og Tórshavnar býráð sum ein stóran part í samstarvinum um hesa ætlan. Og tað er ikki hissini verkætlan, Stóratjørn má sigast at vera. Jákup sigur nevniliga, at í øllum Íslandi finst einki ítróttarøki, ið er flottari enn tað, sum skal verða uppi við Stórutjørn.

Jákup og hansara fólk fingu herfyri ein fyrispurning úr Litava, um tey vildu vera við til at gera eitt minni ítróttarøki har, men tí vóru tey ikki áhugað í. Eitt slíkt ítróttarøki hava tey bara hug at gera í Føroyum, siga tey.

Spurdur, um Stóratjørn er ein gamal dreymur hjá Jákupi, sigur hann, at tað er tað ikki. Eins og hann segði á tíðindafundinum fyri einum stórum fjølmentum føroyskum pressuliði, segði hann, at í fyrstuni varð hugt eftir nýggjum møguleikum á Hálsi í Havn at víðka virksemið har á staðnum, men hann er kvikur at rósa arkitektinum hjá sær fyri, at verkætlanin nú liggur á borðinum sum eitt projekt, ið eitur Stóratjørn, og sum bæði samgonga og andstøða í tí annars ofta tvíbýtta Tórshavnar býráð býrað siga seg taka fult undir við.

### Føroyar kunnu ikki liva av framleiðslu

Hann heldur tó at ein hugburðsbroyting er neyðug í Føroyum, um vit skulu klára okkum í kappingini við okkara grannalond.

- Nú mugu vit velja, um vit vilja vera eitt bygdasamfelag í Evropa ella ein partur av umheiminum, sigur Jákup.

Vit hava hagtøl sum vísa at fráflytingin úr Føroyum er størri enn tilflytingin í løtuni, men eins og hann hevur gjørt áður, eftirlýsir Jákup á Dul Jacobsen hagtøl fyri eitt nú búskaparvøkstur í Føroyum. Hann heldur, at vit áttu at býtt Føroyar sundur, so fiskivinna, fíggjarvinna, ferðavinna og síðani blandaðar tænastuvinnur við eitt nú tøkni til fiskivinnuna vórðu skipað í møguligar eindir ella vinnueindir, eins og tað er av týdningi, at lata privata vinnulívið – møguliga tað útlendska – verða við í gransking.

– Føroyar fara ongantíð at framleiða nakað, um so lønin kemur niður á null, sigur Jákup avgjørdur, og tí metir hann tað vera neyðugt við vinnum, har internet og annað teldusamskifti upploysir týdningin av landafrøðiligari frástøðu.

Ein avleiðing av eini vaksandi fíggjarvinnu hevur nevniliga verið í Íslandi, at ov fá tíma at arbeiða í fiskivinnuni, og tí er tað avgerandi, at føroyingar fyrireika seg og royna at fáa sítt fólk heimaftur, so nýggjar vinnur kunnu mennast, og tey kunnu arbeiða fyri heimlandið heldur enn onnur lond.

Enn dugir Jákup á Dul Jacobsen ikki at siga, um vit hava sæð tað endaliga modellið av Stórutjørn, ella um hann fer at gera aðrar íløgur í Føroyum.

Spurdur, um hann t.d. hevur hugsað um aðrar tættir í einum býarmodelli enn ráðstevnuhøli og ítróttarhentleikar, sigur Jákup, at eftir hansara tykki hevði ein privatskúli við enskum sum sergrein verið eitt gott hugskot at sett á stovn.

Enn liggur tó ikki meira á tekniborðinum, men Jákup kallar seg spontanan, og sum hann sigur, so hevði tað heldur ikki verið heilt býtt eisini at havt bowling og biograf á Stórutjørn eisini. Men tað fer tíðin at vísa.



*Jákup á Dul Jacobsen saman við Selmari Nielsen, arkitekti, og Nils Stórá, samstarvsfelaga*